# Tilmæli frá Fiskidaganevndini
# til
# landsstýrismannin í fiskivinnumálum
# fyri
# fiskiárið 2016/2017

Tórshavn 20. juni 2016

# 1. Inngangur

Fiskidaganevndin er sett við heimild í § 5 stk. 10 í løgtingslóg nr. 28 um vinnuligan fiskiskap frá 10. mars 1994, við seinni broytingum.

**Uppgávan** hjá Fiskidaganevndini er at lata landsstýrismanninum metingar um støðuna í botnfiskastovnunum og tilmæli um fiskidagar, og hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiárið.

**Limir í nevndini eru:**
Dennis Holm, formaður, (Rúna Hjelm, næst-forkvinna), Dánjal í Skálum, Partrolarar; Bjarni Kass, Trolbátar; Sámal Debes, Meginfelag Útróðrarmanna; Hálvdan Gudmundsen, Felagið Línuskip, Sámal Poulsen, Føroya Fiskimannafelag.

Skrivari er Hertha Olsen.

# 2. Bakgrund og tilmæli

Fiskidaganevndin hevur í samband við tilmælið fyri fiskiárið 2016/2017 greinað hagtalstilfar, kunngerðir um friðing og aðrar ásetingar, sum ávirka fiskivinnuna, umframt at tilfar frá fiskifrøðingum í Føroyum og uttanlands eisini hevur verið partur av viðgerðini.

Fiskidaganevndin hevur eisini havt evnisdagar og fundir við fiskifrøðingar, havfrøðing, lívfrøðing, fiskimenn, serkøn innan fiskiskap undir Føroyum og veðurkønum. Hesi fundir hava verið alment atgongiligir fyri landspolitikkarar.

Eins og undanfarin ár, hevur Fiskidaganevndin í samband við tilmælið latið gjørt kanning millum fiskimenn, *sí hjáløgdu frágreiðing "Samrøðukanning millum fiskimenn 2016"*.

Harumframt hevur Fiskidaganevndin eisini gjørt lýsing av broytingunum í flotanum seinastu árini og í friðaðum økjum, *sí hjáløgdu framløgu "Skip & bátar, atgongd og dagar"*.

## 2.1. Færri skip, færri dagar, færri økir og minni roynd

Fiskidagaskipanin er ein sokallað effort skipan, tað vil siga ein skipan, sum er grundað á "innsatsin", tvs. grundað á hvussu nógv skip (stødd av skipum og reiðskapur) og hvussu nógvir fiskidagar eru virknir í skipanini. Í stuttum kann sigast: Jú, fleiri skip til fiskiskap, jú størri er "innsatsurin", og jú færri skip, jú minni er "innsatsturin"; og er hetta kjarnin í sjálvari Fiskidagaskipanini.

Ein annar týðandi partur av stýringsamboðunum í Fiskidagaskipanini er skipanin við avmarkingum í atgongd til fiskiskap á ymsu leiðinum á landgrunninum (innanfyri 100 favnar). Hendan avmarkingin er skipað við árligum friðingum í styttri og longri tíðarskeið. Friðingarnar eru bæði fyri ymiskum reiðskapi og ymiskum skipastøddum. Harumframt eru nógv økir eisini friðaði í samband við gýting, sokallaðu gýtingarfriðingarnar, í vártíðini.

Síðani Fiskidagaskipanin varð sett í gildið í 1996/97 eru sera nógvar og víttfevnandi broytingar og tillagingar farnar fram. Fiskiflotin á botnfiskaveiðu undir Føroyum er nógv broyttur (flotin er minkað3ur heilt nógv), samstundis sum talið av friðingum er nógv víðkað. Harumframt er fiskidagatalið meiri enn hálverað síðani skipanin varð sett í gildið.

Við øðrum orðum er innsatsurin, bæði tal av skipum og bátum og tal av døgum, minkaður nógv seinastu 20 árini, samstundis sum økini, sum fiskast kann á hava verið fyri munandi minking.

**Bara 72 skip og bátar í vinnu!**
Fyri smáum 10 árum síðani, fiskiárið 2006/2007, vóru útskrivaði tilsamans 603 fiskiloyvir til fiskiskip og bátar (bólkarnar 2 til og við 5B), ið virkaðu undir Fiskidagaskipanini. Verður bólkur 5B, sum einamest fevnir um frítíðarfiskarar, tikin burturúr, so var talið 247 loyvir.

Hetta fiskiárið, 2015/2016, eru tað útskrivaði 382 fiskiloyvir til skip og bátar í bólkunum 2 til og við 5B. Verður bólkur 5B tikin burtúr, so eru tað hetta fiskiárið útskrivaði 102 fiskiloyvir til vinnuliga rikin fiskifør eftir botnfiski undir Føroyum. Talan er sostatt um minking á umleið 60% í 9-10 ár.

Av teimum 102 fiskiloyvunum, sum eru útskrivaði hetta fiskiárið, eru bara 72 skip og bátar í vinnu.

Innsatsurin, tá umræður talinum av skipum og bátum, er sostatt metlágur í mun til tá Fiskidagaskipanin kom í 1996/1997.

**Fleiri enn 25.000 fiskidagar tiknir úr skipanini !**
Fyrsta árið undir Fiskidagaskipanini var dagatalið ásett til at verða 43.858 fiskidagar (49.858 fiskidagar í eitt 15 mánaðarskeið) til skip og bátar í bólkunum 2 til og við 5B. Lemmatrolarar, sum tá vóru í bólki 1, vóru ikki við í Fiskidagaskipanini, men royndu tá í miðal í umleið 270 dagar um árið. Tey 13 skipini í bólki 1 fiskaðu tá tilsamans í umleið 3.510 dagar, og var fiskidagatalið í 1996/1997 sostatt smáar 47.400 dagar.

Fiskiárið 2015/2016 var fiskidagatalið ásett til at verða 22.182 fiskidagar, ella góðar 25.000 fiskidagar færri enn í 1996/1997. Í miðal eru tað hvørt ár tiknir smáir 1.200 fiskidagar úr skipanini, síðani Fiskidagaskipanin sá dagsins ljós.

Innsatsurin, tá umræður talinum av fiskidøgum, er sostatt eisini metlágur í mun til tá Fiskidagaskipanin kom í 1996/1997.

**Nógv minni roynd!**
Verður hugt eftir fiskiskapinum undir Føroyum hetta fiskiárið, so hevur tað hetta árið ikki verið nógv roynd undir Føroyum. Ein vanligan fiskidag hava tað í miðal verið 25,71 fiskiskip og -útróðrarbátar til fiskiskap.

Verður hugt eftir teimum ymisku bólkunum, so var hetta talið av skipum, sum var til fiskiskap "ein vanligan dag" í tíðarskeiðinum frá 1. sept. 2015 til 20. juni 2016.

*Tal av skipum, sum eru til fiskiskap undir Føroyum*
*"ein vanligan dag" í miðal fyri fiskiárið 2015/2016*

14,10 trolarar í bólki 2
4,32 línuskip í bólki 3
0,66 útróðrarbátar í bólki 4A
1,89 útróðrarbátar í bólki 4B
2,50 trolbátar í bólki 4T
2,24 útróðrarbátar í bólki 5A
**25,71 skip og bátar tilsamans**

Innsatsurin, tá umræður roynd undir Føroyum, er sostatt eisini metlágur, tá samanborið verður við t.d. 2000 og 2001, tá metnógv skip vóru í vinnu og metnógvir fiskidagar vórðu brúktir.

**Nógvar friðingar**
Eitt er, at innsatsurin – tvs. talið av fiskiskipum og -bátum í vinnu, og talið av útskrivaðum fiskidøgum – er metlágur í mun til fyri 20 árum síðani, men harumframt eru tað hetta tíðarskeiðið eisini framdar stórar økingar í friðingunum á landgrunninum.

Friðingar:

- Umleið 50% av landgrunninum[1] uttanfyri 12 fjórðingar er friðaður fyri trolveiðu ein part av árinum ella alt árið.
- Ein stórur partur av landleiðini innanfyri 12 fjórðingar er friðað fyri húk partar av árinum.
- Øll landleiðin innanfyri 12 fjórðingar er friðað fyri trolveiðu alt árið, undantikið 3 mánaðir um summarið, tá trolbátar sleppa at royna á pørtum á landleiðini eftir flatfiski, við uppíblandi av toski og hýsu á hægst 35%. Trolbátar kunnu tó ikki royna innanfyri 6 fjórðingar.[2]
- Ein munandi partur av landleiðini er friðað fyri allari veiðu partar av árinum.
- Friðaðu leiðirnar eru øktar úr 10% av landgrunninum í 1990, til umleið 37,5% í 1994, til meiri enn 50% í 2015.
- Føroya Banki hevur verið friðaður fyri allari veiðu síðani 2008, við undantøku av nøkrum fáum fiskidøgum til útróðrarbátar í bólki 5A um summarið.

**Samanumtikið**

Samanumtikið eru tað farnar fram heilt stórar broytingar tey gott 20 árini Fiskidagaskipanimn hevur virkað.

Stórar minkingar eru í innsatsinum (tal av skipum og bátum og tal av fiskidøgum), og av somu orsøk er royndin minkað heilt nógv. Harumframt eru møguleikarnir hjá skipum og bátum nógv avmarkaðir av friðaðum økjum.

Fiskidaganevndin er av teirri greiðu fatan, at verandi innsatsur ikki ávirkar botnfiskastovnarnir undir Føroyum skeiva vegin.

## 2.2. Viðrák í náttúruumstøðunum

Fiskidaganevndin hevur síðan 2011 gjørt samrøðukanning við fiskimenn og -kvinnur, sum hava sítt dagliga yrki umborð á fiskiskipum og -bátum, ið fiska botnfisk og onnur fiskasløg undir Føroyum.

Millum týðandi viðurskiftini, sum fiskimenn og -kvinnur vísa á í samrøðukanningini, er, at náttúruumstøðurnar ikki hava verið tilvildar fleiri av teimum seinastu árunum. Men í kanningini í 2015 vístu fleiri á, at tað sá betri út, og í 2016 verður sum heild víst á, at náttúruumstøðurnar er broyttar til tað betra: Tað er eitt viðrák í náttúruviðurskiftunum (sí eisini hjáløgdu "Samrøðukanning millum fiskimenn 2016").

Fiskidaganevndin hevur í fleiri ár víst á, at náttúruviðurskiftini eru av avgerandi týdningi fyri hvussu fiskastovnar undir Føroyum eru fyri. Hesi viðurskifti hevur Hjálmar Hátún, Ph.d í havfrøði, sum starvast sum havfrøðingur á Havstovuni, eisini granskað í.

Í spennandi framløgu á evnisdegi hjá Fiskidaganevndini greiddi Hjálmar Hátún frá, hvussu subpolari meldurin, ið kemur suður gjøgnum rennuna millum Grønland og Kanada/New Foundland hevur stóra ávirkan á føðigrundarlagið undir Íslandi og á føroyska landgrunninum.

[1] Innanfyri umleið 100 favna dýpi.

[2] Leggjast kann afturat, at trolbátar í bólki 4T á landleiðini innanfyri 12 fjórðingar í 3 mánaðar skeiðinum at landleiðini er opin í 2015 fiskaðu 123,3 tons av toski, í 2014: 49,6 tons av toski, 2013: 131,5 tons av toski.

Við ávirkan á føðigrundarlagið ávirkar subpolari meldurin eisini fiskastovnar undir Íslandi og undir Føroyum.

Hjálmar Hátún greiddi í framløguni frá, at gransking vísti, at samband er millum sterkan subpolaran meldur og góðan gróður á suðurlandinum í Íslandi (og sannlíkt eisini undir Føroyum, hóast beinleiðis kanningar ikki eru gjørdar). Góð~~ur~~i gróðurin verður mátaður við øking í nøgdini av reyðæti. Reyðætið er beinleiðis føði hjá m.ø. upsa og nebbasild, og nebbasild er týðandi partur av føðigrundarlagnum hjá toski og hýsu.

Vetrarnir 2013/2014 og 2014/2015 hevur subpolari meldurin verið sterkur. -Og vísti Hjálmar Hátún á, at í 2014 vóru metstórar nøgdir av reyðæti og av nebbasild á suðurlandinum í Íslandi, sum sostatt stiðjar undir at sterkt samband er millum subpolara meldurin og føðigrundarlagið á suðurlandinum í Íslandi (og undir Føroyum).

Eins og á suðurlandinum í Íslandi, hava fiskimenn, ið fiska undir Føroyum, víst á at náttúruumstøðurnar er broyttar til tað betra. Meiri æti er í sjónum og nógv nebbasild hevur verið bæði í 2015 og í 2016, samanborið við árini 2011 til 2013, tá ongin nebbasild var at síggja yvirhøvur í fiskinum.

Í framløguni vísti Hjálmar Hátún á, at lítil ivi er í, at eisini føroyski landgrunnurin verður ávirkaður av subpolara meldrinum. Sterkur subpolarur meldur sæst aftur á suðurlandinum í Íslandi og nógv bendir á, at viðrákið í náttúruumstøðunum undir Føroyum eisini stavar frá sterka subpolara meldrinum veturin 2013/2014 og 2014/2015.

Hjálmar Hátún staðfesti í framløguni, at “náttúran burdi verið við” okkum nú. Fiskimenn staðfesta eisini í samrøðukanningini 2016, at viðrák er í náttúruni.

## 2.3. Ein misskiljing um luft!

Ein afturvendandi partur av kjakinum um fiskidagar og Fiskidagaskipanina er um “luft í skipanini”. Í stóran mun er talan um misskiljing av skipanini, tá víst verður til, at “luft er í skipanini”, sipandi til, at nógvir óbrúktir dagar eru í skipanini.

Fiskidagaskipanin er samansett soleiðis, at skipanin eggjar ávísum skipabólkum til roynd á ytru leið, og verður sostatt eggjað til ávísa verju av toska- og hýsustovnunum á innaru leið. Skipanin eggjar eisini til eitt skifti í reiðskapi frá línu til snellu.

Fyri bólkarnir 2, 3, 4A, 4B og 4T telja fiskidagar á ytri leið 3:1. Somu viðurskifti eru galdandi fyri skifti av reiðskapi frá línu til snellu hjá bólki 4A og 4B, har fiskidagarnir telja 2:1.

Við øðrum orðum skal til dømis eitt línuskip í bólki 3, ið roynir eftir longu og brosmu og svartkalva á ytri leið, fiska 3 dagar fyri, at tað telur 1 brúktan fiskidag í skipanini. Somuleiðis skal ein útróðrarbátur í bólki 4A á snelluveiðu fiska í 2 dagar, fyri at tað telur 1 brúktan fiskidag í skipanini.

Umframt nevndu skipanir, so hava havarí, árligt viðlíkahald, vánaligur fiskiskapur, konkurs, vánaligt veður og streymviðurskifti, ósemjur á arbeiðsmarknaðinum o.a. ávirkan á talið av brúktum og óbrúktum fiskidøgum i einum fiskiári.

**Línuskipini og “sjálvskapt luft”**
Seinnu árini hava línuskipini tillagað seg umstøðurnar sum eru, og fiska ein stóran part av árinum aðrastaðni enn undir Føroyum. Ein part av árinum fiska línuskip føroysku kvotuna undir Íslandi ella við Flemish Cap, og fiska eisini við Eysturgrønland (í samstarvi við grønlendsk reiðarí), meðan skipini ein annan part av árinum fiska undir Føroyum, á innaru- og ytru leið.

Í talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir dagatalið hjá trimum línuskipum: Kambur, Sigmund og Vesturhavið.

**Kambur** er frystilínuskip, sum fiskar bæði undir Føroyum, við Flemish Cap, við Eysturgrønland og undir Íslandi. **Sigmund** er línuskip, sum fiskar undir Føroyum, men sum harumframt eisini hevur kvotu við Íslandi og eisini gjørt einstakar túrar við Eysturgrønland. Í mun til Kamb og Sigmund, so fiskar **Vesturhavið** undir Føroyum og undir Íslandi, og hevur hetta fiskiárið gjørt ein túr við Eysturgrønland.

Kambur hevur fiskiárið 2015/2016 verið 234,7 dagar í vinni fram til 20. juni 2016, tá 293 dagar eru farnir av fiskiárinum. Kambur hevur tillutað 168 fiskidagar í 2015/2016, og hevur sambært uppgerðini hjá VØRN higartil (20. juni 2016) brúkt 55,5 fiskidagar, hóast Kambur hevur verið 234,7 dagar í vinnu av teimum 293 døgunum, sum eru farnir av hesum fiskiárinum.

Í talvuni niðanfyri eru uppgerðir fyri fiskidagarnar hjá Kambi, Sigmundi og Vesturhavinum. Í talvuni eru skrásettir dagar, sum skipini veruliga hava verið í vinnu, og fiskidagar, sum eru skrásettir hjá VØRN, sum brúktir dagar.

| | **KAMBUR** | | **SIGMUND** | | **VESTURHAVIÐ** | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Dagar í vinnu | Dagar skrásettir hjá VØRN | Dagar í vinnu | Dagar skrásettir hjá VØRN | Dagar í vinnu | Dagar skrásettir hjá VØRN |
| Flemish Cap | 44,9 | 44,9 | 0,0 | 0,0 | | 0,0 |
| Undir Íslandi | 42,2 | 42,2 | 44,2 | 44,2 | 40,4 | 40,4 |
| Við Eysturgrønland | 92,1 | 92,1 | 17,6 | 17,6 | 9,1 | 9,1 |
| Ytri leið undir Føroyum | 11,7 | 3,9 | 46,1 | 15,4 | 1,7 | 0,6 |
| Innari leið undir Føroyum | 43,8 | 43,8 | 65,9 | 65,9 | 136,7 | 136,7 |
| | | | | | | |
| **Dagar í vinnu tilsamans:** | **234,7** | **226,9** | **173,8** | **143,1** | **187,8** | **186,7** |
| **Dagar í vinnu undir Føroyum:** | **55,5** | | **112,0** | | **138,3** | |
| **Skrásett hjá VØRN sum brúktir fiskidagar:** | **47,7** | | **81,2** | | **137,2** | |
| Tillutaðir fiskidagar: | 168,0 | | 202,3 | | 146,0 | |
| Dagar eftir / óbrúktir dagar: | 120,3 | | 121,0 | | 8,8 | |
| "Sjálvskapt luft" *(tillutaðir dagar minus brúktir dagar):* | 120,3 | | 121,0 | | 8,8 | |
| *Fiskiárið er 293 dagar "gamalt"* | | | | | | |

Línuskipini eru eitt dømi um, at flotin hevur tillagað seg støðuna, sum er í løtuni, og er farin at royna aðrar leiðir og fiskar onnur fiskasløg í mun til fyrr, tá línuskipini einamest royndu inni

á landgrunninum eftir toski og hýsu. Hetta eru eisini millum orsøkirnar til at minni av toski og hýsu verður fiskað undir Føroyum.

Leggjast kann afturat, at teir fiskidagar, sum ikki verða brúktir á innaru leið, ella undir Føroyum yvirhøvur, í einum fiskiári, í sær sjálvum er “ein friðing” av landgrunninum.

## 2.4. Ikki stórt trýst á landgrunnin !

Fiskidaganevndin metir ikki at lítla royndin, sum er undir Føroyum førir við sær stórt trýst á landgrunnin og at talan er um ovurfisking. Í samrøðukanningini, sum Fiskidaganevndin hevur gjørt, stuðlar ein stórur partur av fiskimonnunum eisini hesari fatan, og vísa til, at tað eru nátttúrviðurskiftini, sum eru høvuðsorsøkin til at støðan hevur verið vánalig hjá botnfiskastovnunum undir Føroyum.

## 2.5. Kanning millum fiskimenn

Sætta árið á rað hevur Fiskidaganevndin latið gjørt samrøðukanning við fiskimenn, sum hava sítt dagliga yrki umborð á fiskiskipum og -bátum, sum virka innan Fiskidagaskipanina og fiska botnfisk og onnur fiskasløg undir Føroyum.

Fiskidaganevndin er av teirri greiðu fatan, at tað hevur alstóran týdning, at ráðgevingin til landsstýrismannin eisini fevnir um at fiskimenn og -kvinnur, sum hava dagliga yrki á sjónum, sleppa til orðanna og siga sína hugsan um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum og náttúruviðurskiftunum í sjónum. Hesi fiskafólk eru eftir áratíggjur av persónligum royndum og eygleiðingum, styrkt við royndum og eygleiðingum, sum onnur hava borið víðari til tey, vorðin serfrøðingar á teirra økið. -Og hava hesi av somu orsøk sterkt grundarlag til at siga nakað um hvussu støðan er hjá botnfiskasløgunum, og um hvussu náttúruviðurskiftini eru.

Fyrimunurin við hesum slagnum av vísindarligari tilgongd er, at samrøðukanningin gevur eina mynd av hvussu støðan er júst nú, í tí tíðarskeiðinum, sum samrøðurnar verða gjørdar. Royndir fiskimenn við sínum dagliga yrki á sjónum gerast varugir við broytingarnar og “tulka” broytingarnar, meðan tær fara fram; og er júst hetta styrkin við hesum slagnum av vísindaligum kanningum. -Í mun til aðrar vísindaligar kanningar, har søgulig hagtøl og modellir ikki altíð “fanga” broytingarnar fyrr enn eftir eina ávísa tíð. Dømi eru eisini um, at stórar broytingar í náttúruviðurskiftunum ikki hava verið “fangaðar” av modellum. Grefligasta dømi er helst tá toskurin tørnaði til aftur í 1996.

Men hóast tvær ymiskar vísindaligar tilgongdir, so hava báðar til endamáls at royna at greina og meta um, hvussu støðan hjá fiskastovnunum er, og hvussu náttúruviðurskiftini eru í broyting og ávirka fiskasløgini. Báðar tilgongdir hava til endamáls at styrkja vitanargrundarlagið um føroysku fiskastovnarnar og broytingarnar í náttúruni. Ein tilgongd er ikki rættari enn onnur, hóast kjakið í Føroyum leggur upp til “at velja síðu”. Heldur eiga úrslitini frá báðum sløgum av kanningum at verða brúktar í felag og í uppbyggjandi kjaki í samband við, at vit royna at styrkja vitanargrundarlagið undir skipanini av fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum.

**Høvuðsniðurstøðurnar í samrøðukanningini**

Høvuðsniðurstøðurnar í samrøðukanningini millum fiskimenn eru, at náttúruviðurskiftini nú eru væl betri enn undanfarin ár. Nógv meiri æti er at síggja nú enn undanfarin ár, og

nebbasildin er í støðugum vøkstri 3. árið á rað; eftir at nebbasild ikki hevur verið at sæð árini 2011-2013. Í stuttum verður víst á, at tað nú á 2. ári er eitt viðrák í náttúruviðurskiftunum.

Í kanningini verður eisini víst á, at 2. árið á rað sær tað betri út hjá toskinum. Meiri er til av toski og toskurin er feitur. Eisini verður mett, at tilgongdin er góð.

Hýsustovnurin er eisini í framgongd, eftir at støðan hevur verið vánalig í fleiri ár. Hýsan er eins og toskurin sera feit og tilgongdin er betur í ár enn undanfarin ár.

Hvat viðvíkur upsanum, so eru fiskimenn meiri ivasamur, serliga tí at so nógvur smáur upsi er at fáa, og lítið og onki av hampiligari stødd. Í samrøðukanningini í 2015 og 2014 vístu fleiri fiskimenn á, at tað var eitt vandamál, at ongin smáur upsi var at fáa, men hetta er nú broytt, tí sera nógv av smáum upsa er komin inn í fiskiskapin í ár. Mett verður av somu orsøk, at tilgongdin av upsa er góð.

Sum heild lata fiskimenn væl betri at í kanningini í 2016. Allur fiskurin er sum heild sera feitur, og eru tískil góðar vónir til framhaldandi framgongd í komandi tíðum.

Frágreiðingin "*Samrøðukanning millum fiskimenn 2016*" er løgd við sum fylgiskjal.

## 2.6. Tilmælið um fiskidagatal fyri fiskiárið 2016/2017

Fiskidagaskipanin er sum nevnt ein sokallað "effort skipan", sum er grundað á hvussu stórur innsatsurin er, hvussu nógv skip og bátar, og hvussu nógvir fiskidagar eru virknir í skipanini.

Gongdin seinastu árini hevur verið heilt greið:

- Talið av skipum og bátum, bæði talið av útskrivaðum loyvum, og tali av skipum og bátum, sum eru í vinnu, er minkað heilt nógv, við meiri enn 60%, seinastu 9-10 árini.
- Í 2015/2016 eru 102 fiskiloyvir útskrivaði til skip og bátar í bólkunum 2 til og við 5A. Av hesum hava 72 verið í vinnu hetta fiskiárið
- Í 2007/2008 vóru útskrivaði 247 fiskiloyvir til bólkarnir 2 til og við 5A.
- Talið av tillutaðum fiskidøgum er skert við meiri enn 50% síðani fiskidagaskipanin kom. Góðir 25.000 fiskidagar eru tiknir úr skipanin síðani hon kom í gildið 1996/1997.
- Innsatsurin, royndin undir Føroyum, hetta fiskiárið er metlág, tá samanborið verður við t.d. 2000 og 2001, tá metnógvir fiskidagar vórðu brúktir.
- Ein vanligan dag eru tað umleið 25 fiskiskip og útróðrarbátar til fiskiskap undir Føroyum.
- Umframt minking í innsatsinum, so er atgongdin til fiskiskap eisini avmarkað munandi síðani Fiskidagaskipanin varð sett í gildið.
- Stórar avmarkingar eru í hvar fiskiskip og -bátar kunnu royna, tí stórur partar av landgrunninum (innanfyri 100 favnar) er friðaður alt árið ella partar av árinum.

**Náttúruviðurskiftini eru við okkum!**

Í framløgum á kunnandi fundi hjá Havstovuni varð greitt frá, at náttúruviðurskiftini hava stóra ávirkan á fiskastovnarnar. Víst varð á, at eru náttúruviðurskiftini ímóti, so kunnu fiskastovnar minkað, hóast als ongin fiskiskapur er. Øvugt kunnu fiskastovnar veksa skjótt, um náttúruviðurskiftini eru við, eisini um veiðutrýstið er stórt; hetta hevur t.d. verið støðan hjá upsastovninum, varð víst á í framløgu á Havstovuni.

Í framløgu frá Hjálmari Hátún, Ph.D. í Havfrøði, varð víst á, at náttúruumstøðurnar eru betri nú enn tær hava verið í fleiri ár. Kanningin, sum Fiskidaganevndin hevur gjørt millum fiskimenn í 2016, bendir eisini greitt á, at náttúruumstøðurnar eru við okkum.

Nógv bendir á, at viðrákið í náttúruumstøðunum, sum hevur verið seinastu 1-2 árini, hevur ført við sær, at fleiri av týðandi botnfiskastovnunum eru í vøkstri.

**Skipanin skal ikki stillast ár um ár**
Fiskidaganevndin leggur dent á, at tilmælið er grundað á, at veiðan eftir botnfiski undir Føroyum er skipað í einari "effort-skipan", og ikki út frá einari kvota-stýrdari skipan. Hetta merkir, at skipanin, fiskidagar og talið av fiskiloyvum, ikki skal stillast ár um ár.

Fiskidaganevndin er av teirri greiðu fatan, at støðan hjá botnfiskastovnunum undir Føroyum verður ikki ávirkað skeiva vegin av verandi roynd undir Føroyum.

Tikið verður inn í myndina, at farnar eru fram stórar skerjingar av flotanum og fiskidøgum seinastu 20 árini, samstundis sum atgongdin til grunnarnar eru munandi skerdar við friðingum.

Tikið verður eisini inn í myndina, at náttúruviðurskiftini eru við okkum og fiskimenn lata væl at støðuni hjá botnfiskastovnunum.

Hesi viðurskifti gera, at nevndin mælir til, at fiskidagatalið komandi fiskiár verður óbroytt.

## 2.7. Tillagingar av bólki 5A og 5B

Fiskidagaskipanin er skipan, sum hevur til endamáls at skipa vinnuligan fiskiskap undir Føroyum. Í verandi skipan eru vinnuliga rikin fiskifør í bólkunum 2 til og við 5A, meðan fiskiførini í bólki 5B í stóran mun eru frítíðarfiskari (hóast nakrir vinnurekandi eru í hesum bólkinum).

Mælt verður til, at tað saman við vinnuni verður gjørd ein endurskoðan av skipanini við bólki 5A og 5B, soleiðis at skipanin í størri mun er vinna.

## 2.8. Tillaging av 60%-regluni

Ein partur av skipunum, sum eru virkin í Fiskidagaskipanini, hava brúkt ov fáar fiskidagar til at kunna avhenda teir áðrenn 1. juni, hetta sambært sokallaðu 60%-regluni.

Seinastu árini eru fleiri dømir um, at skip og bátar, sum hava tørv á fiskidøgum, ikki fáa atgongd til fiskidagar, fyrr enn eftir 1. juni. Mælt verður til at tillagingar verða gjørdar, soleiðis at fiskidagar kunnu flytast inni í einum bólki, uttan forðingar.

## 2.9. Endurskoðan av stongdum leiðum

Í nógv ár hava stórir partar av landgrunninum verið stongdir fyri fiskiskap í pørtum av árinum ella alt árið, umframt at gýtingafriðingar eru gjørdar í vártíðini.

Fiskidaganevndin tekur undir við at leiðir eru stongdar fyri at verja ungfisk og í samband við gýting. Men nevndin sær ikki stórvegis endamál í at friða økir bara fyri at friða.

Til dømis hevur Føroya Banki síðan 2008 verið friðaður fyri allari veiðu, undantikið nøkrum fiskidøgum til útróðrarbátar í 5A um summarið. Hóast friðing, so hava yvirlitstrolingar ikki víst nakra framgongd.

Mælt verður til at gera royndarfiskiskap á stongdum leiðum við vinnuliga riknum fiskiførum.

Tað er ikki nøktandi, at stór økir eru friðaði, uttan at gjølligar kanningar verða gjørdar hvørt ár. Hesar kanningar kundu verið gjørdar í samstarvi millum vinnuna og Havstovuna.

Mælt verður til at 100 fiskidagar verða settir av til royndarfiskiskap undir leiðslu av Fiskidaganevndini, sum ger royndarskipan í samstarvi við Havstovuna.

# 3. Støðulýsing

## 3.1. Kanning millum fiskimenn 2016

Sætta árið á rað hevur Fiskidaganevndin latið gjørt samrøðukanning við fiskimenn, sum hava sítt dagliga yrki umborð á fiskiskipum og -bátum, sum virka innan Fiskidagaskipanina og fiska botnfisk og onnur fiskasløg undir Føroyum.

Samrøðukanningin er liður í arbeiðinum hjá Fiskidaganevndini at lata tilmælið til landstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna hjá botnfiskastovnunum, um fiskidagar og um hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiár.

Kanningini og frágreiðingin er gjørd eftir sama leisti ár um ár, soleiðis at úrslitini kunnu samanberast yvir áramál.

**Vísindalig tilgongd og veruleikafatan**

Fiskidaganevndin er av teirri greiðu fatan, at tað hevur alstóran týdning, at ráðgevingin til landsstýrismannin eisini fevnir um at fiskimenn og -kvinnur, sum hava dagliga yrki á sjónum, sleppa til orðanna og siga sína hugsan um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum og náttúruviðurskiftini í sjónum. Hesi fiskafólk eru eftir áratíggjur av persónligum royndum og eygleiðingum, styrkt við royndum og eygleiðingum, sum onnur hava borið víðari til tey, vorðin serfrøðingar á teirra økið. -Og hava av somu orsøk sterkt grundarlag til at siga nakað, um hvussu støðan er hjá botnfiskasløgunum, og um hvussu náttúruviðurskiftini eru.

Fyrimunurin við hesum slagnum av vísindarligari tilgongd er, at samrøðukanningin gevur eina mynd av hvussu støðan er júst nú, í tí tíðarskeiðinum, sum samrøðurnar verða gjørdar. Royndir fiskimenn við sínum dagliga yrki á sjónum gerast varugir við broytingarnar og "tulka" broytingarnar, meðan tær fara fram; og er júst hetta styrkin við hesum slagnum av vísindaligum kanningum. -Í mun til aðrar vísindaligar kanningar, har søgulig hagtøl og modellir ikki altíð "fanga" broytingarnar fyrr enn eftir eina ávísa tíð. Dømi eru eisini um, at stórar broytingar í náttúruviðurskiftunum ikki hava verið "fangaðar" av modellum. Grefligasta dømi er helst tá toskurin tørnaði til aftur í 1996.

**Ymiskar tilgongdir við sama endamáli**

Samrøðukanningin við fiskimenn og -kvinnur er grundað á tilgongd, har fiskimenn og -kvinnur sum serfrøðingar á sínum øki sleppa at seta orð á hvussu tey uppliva støðuna hjá fiskastovnunum og í náttúruni.

Samrøðukanningin hevur aðra tilgongd enn t.d. kanningar hjá fiskifrøðingum, sum eru grundaðar á eitt nú yvirlitstrolingar á ymiskum tíðum av árinum, við uppteljingum av fiski og øðrum úrslitum av yvirlitstrolingum.

Men hóast tvær ymiskar vísindaligar tilgongdir, so hava báðar til endamáls at royna at greina og meta um hvussu støðan hjá fiskastovnunum er og hvussu náttúruviðurskiftini eru í broyting og ávirka fiskasløgini. Báðar tilgongdir hava til endamáls at styrkja vitanargrundarlagið um føroysku fiskastovnarnar og broytingarnar í náttúruni. Ein tilgongd er ikki rættari enn onnur, hóast kjakið í Føroyum leggur upp til "at velja síðu". Heldur eiga úrslitini frá báðum sløgum av kanningum at verða brúktar í felag og í uppbyggjandi kjaki í samband við at vit royna at styrkja vitanargrundarlagið undir skipanini av fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum.

**Viðrák í náttúruviðurskiftunum**
Eftir eitt tíðarskeið har fiskimenn og -kvinnur í samrøðukanningunum hava víst á, at náttúruviðurskiftini í nógv ár ikki hava verið tey røttu til at skapa góðar umstøður fyri botnfiskastovnarnir undir Føroyum, er okkurt sum bendir á, at støðan er broytt, og eitt viðrák er í náttúruviðurskiftunum. Hetta meta í øllum førum fiskimenn, sum hava sítt dagliga yrki á sjónum.

Undanfarin ár, fram til og við 2014, hava fiskimenn og -kvinnur í samrøðunum víst á, at náttúruviðurskiftini eru vánalig, onki æti hevur verið at síggja og ongin nebbasild, men støðan tykist verða broytt seinastu tvey árini.

Í bæði 2015 og 2016 eru tað ein heilt stórur partur av teimum, sum hava luttikið í kanningini, sum vísa á, at støðan viðv. æti er góð ella hampilig. Í mun til árini 2011 til 2014, so eru tað nú sera fá, sum siga at støðan er ring við æti.

**Lata væl at støðuni hjá toskinum**
Fiskimenn og -kvinnur hava seinastu tvey árini latið hampiliga væl at støðuni hjá toskinum. Tilsamans góð 80% siga í kanningini í 2016 at støðan er góð, meðan bert góð 10% siga støðuna verða ringa.

Í 2011 lótu fiskimenn og -kvinnur hampiliga væl at støðuni hjá toskastovninum. Hampiliga tilgongd var í væntu, men hendan støðan broyttist heilt í 2012 og 2013. Høvuðsorsøkin var at náttúruumstøðurnar ikki vóru við, m.a. var ov lítið at eta hjá toskinum.

Tey seinastu 2-3 árini er í samrøðukanningunum víst á, at støðan hjá toskinum blívur betri og betri. Náttúruviðurskiftini tykjast eisini at broytast til tað betra, tí hesi bæði seinastu árini hava fiskimenn latið sera væl at støðuni við æti og ikki minst viðv. nebbasild.

Hesi viðurskifti gera eisini, at fiskimenn í 2016 meta støðuna hjá toskinum verða góða ella hampiliga í mun til undanfarin ár. Toskurin er eisini feitur, og tilgongdin hevur verið góð ella hampilig samanborin við undanfarin ár.

**Hýsustovnurin í framgongd**
Tendensurin seinastu tvey til trý árini hevur verið rættiliga greiður tá umræður hýsuna: Tað eru alsamt fleiri, sum meta støðuna hjá hýsuni verða betri og betri.

Spurd um hvussu støðan hjá hýsuni er í mun til undanfarin ár, eru tað eisini ein stórur meiriluti av teimum, sum luttóku í kanningini, sum siga, at støðan er hampilig ella góð. 21% siga støðuna verða betri enn undanfarin ár, 61% siga støðuna verða hampiliga í mun til undanfarin ár, meðan 11% siga støðuna verða ringa í mun til undanfarin ár. Sostatt eru tað væl fleiri sum siga støðuna verða góða og hampiliga, meðan færri siga støðuna verða ringa – um samanborið verður við undanfarnu 4-5 árini.

Hýsan er feit og mett verður eisini at tilgongdin er hampilig ella góð í mun til undanfarin ár.

**Upsin í broyting**
Hvat viðvíkur upsanum, so eru fiskimenn meiri ivasamur, serliga tí at so nógvur smáur upsi er at fáa, og lítið og onki av hampiligari stødd. Í samrøðukanningini í 2015 og 2014 vístu fleiri fiskimenn á, at tað var eitt vandamál, at ongin smáur upsi var at fáa, men hetta er nú broytt, tí

sera nógv av smáum upsa er komin inn í fiskiskapin í ár. Mett verður av somu orsøk, at tilgongdin av upsa er góð.

Hóast upsin er feitur og tilgongdin hevur verið góð seinasta árið, so eru fiskimenn, sum hava luttikið í kanningini, ivasamir um støðuna hjá upsanum. 58% siga støðuna verða hampiliga, men 32% siga støðuna verða ringa, og er hetta fleiri enn í 2015 og í 2014.

## 3.2. Veiðuorkan minkar framhaldandi

Í 2015/2016 eru útskrivaði 102 fiskiloyvir til skip og bátar í bólkunum 2 til og við 5A (talva 1 niðanfyri). Av hesum eru 72 skip og bátar í vinnu (talva 2 niðanfyri).

**Talva 1. Útskrivaði fiskiloyvir**

| Bólkur | 1 | 2 | 3 | 4A | 4B | 4 T | 5A | 5B | Tils. uttan blk. 5 | Tils. við blk. 5A. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **Tal** | **Tal** | **Tal** | **tal** | **tal** | **tal** | **Tal** | **Tal** | | |
| **1998-99** | 13* | 32 | 20 | 51 | 45 | | | | 161 | |
| **1999-00** | 13* | 33 | 19 | 53 | 45 | | | | 163 | |
| **2000-01** | 13* | 32 | 19 | 51 | 42 | | | | 157 | |
| **2001-02** | 13* | 32 | 19 | 50 | 44 | | | | 158 | |
| **2002-03** | 13* | 31 | 19 | 53 | 40 | | | | 156 | |
| **2003-04** | 13* | 30 | 19 | 38 | 44 | | | | 144 | |
| **2004-05** | 13* | 31 | 19 | 32 | 48 | | | | 143 | |
| **2005-06** | 13* | 30 | 25 | 24 | 21 | 16 | | | 129 | |
| **2006-07** | 13* | 24 | 28 | 24 | 22 | 17 | | | 128 | |
| **2007-08** | 13* | 28 | 25 | 20 | 21 | 16 | 124 | 356 | 123 | 247 |
| **2008-09** | 13* | 28 | 24 | 17 | 19 | 14 | 108 | 301 | 115 | 222 |
| **2009-10** | 13* | 26 | 23 | 16 | 20 | 11 | 68 | 631 | 109 | 176 |
| **2010-11** | 10 | 26 | 20 | 16 | 17 | 10 | 74 | 633 | 99 | 173 |
| **2011-12** | 11 | 26 | 20 | 16 | 17 | 10 | 43 | 594 | 100 | 143 |
| **2012-13** | 11 | 24 | 18 | 10 | 16 | 9 | 39 | 493 | 88 | 127 |
| **2013-14** | 10 | 26 | 16 | 12 | 13 | 9 | 25 | 468 | 86 | 111 |
| **2014-15** | | 35 | 16 | 9 | 10 | 8 | 31 | 289 | 78 | 109 |
| **2015-16** | | 35 | 18 | 9 | 13 | 7 | 20 | 280 | 82 | 102 |

*Útskrivaði loyvir pr. 20. juni 2016 (Kelda: VØRN)*

**Viðm. Bólkur 1 kom ikki uppí fiskidagaskipanina fyrr enn í 2011, tá bólkur 1 varð lagdur saman við bólki 2. Áðrenn hetta vóru tað 13 lemmatrolarar/djúpvatnstrolarar í bólki 1.*

*NB! Útskrivaði loyvir merkir ikki neyvturviliga vinnuliga virkin loyvir. Loyvir verða eisini útskrivaði fyri at avhenda dagar.*

**Talva 2. Skip í vinnu og útskriva loyvir**

| Bólkur | 2 | 3 | 4A | 4B | 4T | 5A | Loyvir í vinnu | Útskrivaði Loyvir |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skip í vinnu** | 30 | 14 | 3 | 6 | 6 | 13 | 72 | 102 |

Síðan 2007/2008 er talið av útskrivaðum fiskiloyvum í Fiskidagaskipanini, bólkarnir 2 til og við 5A, minkað úr 247 niður í 102 útskrivaði loyvir fiskiárið 2015/2016. Talið av útskrivaðum loyvum er sostatt minkað við útvið 60% seinastu umleið 10 árini. Av teimum 102 útskrivaðu fiskiloyvunum, hava 72 verið í vinnu í tíðarskeiðinum 1. sept. 2015 – 31. mai 2016.

**Rakstur í tíðarskeiðinum 1. sept. 2015 til 31. mai 2016:**
Bólkur 2: 7 skip hava brúkt sera fáar fiskidagar fiskiárið 2015-2016
Bólkur 3: 8 skip hava brúkt ongan ella sera fáar fiskidagar fiskiárið 2015-2016
Bólkur 4A: 4 skip hava brúkt ongan ella sera fáar fiskidagar fiskiárið 2015-2016.
Bólkur 4B: 5 skip hava brúkt ongan ella sera fáar fiskidagar fiskiárið 2015-2016.
Bólkur 4T: 1 skip hevur ongan fiskidag brúkt fiskiárið 2015-2016.

**Talva 3. Tillutaðir fiskidagar**

| Bólkur | 1 | 2 | 3 | 4 A | 4 B | 4 D | 4 T | 5 | Dagar tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1996/1997 | | 8.225 | 3.040 | 5.600 | 3.410 | 1.650 | | 27.000 | 49.585 |
| 1997/1998 | | 7.199 | 2.660 | 4.696 | 4.632 | | | 23.625 | 43.389 |
| 1998/1999 | | 6.839 | 2.527 | 4.461 | 4.400 | | | 22.444 | 41.219 |
| 1999/2000 | | 6.839 | 2.527 | 4.461 | 4.400 | | | 22.444 | 41.219 |
| 2000/2001 | | 6.839 | 2.527 | 4.461 | 4.400 | | | 22.444 | 41.219 |
| 2001/2002 | | 6.839 | 2.527 | 4.461 | 4.400 | | | 22.444 | 40.671 |
| 2002/2003 | | 6.771 | 2.502 | 4.416 | 4.356 | | | 22.220 | 40.265 |
| 2003/2004 | | 6.636 | 2.452 | 4.328 | 4.269 | | | 21.776 | 39.461 |
| 2004/2005 | | 6.536 | 2.415 | 4.263 | 4.205 | | | 21.449 | 38.868 |
| 2005/2006 | | 5.752 | 3.578 | 1.770 | 2.067 | | 1.766 | 21.235 | 36.168 |
| 2006/2007 | | 5.752 | 3.471 | 1.717 | 2.005 | | 1.713 | 20.598 | 35.256 |
| 2007/2008 | | 5.637 | 3.402 | 1.683 | 1.965 | | 1.679 | 20.186 | 34.552 |
| 2008/2009 | | 5.073 | 3.062 | 1.515 | 1.769 | | 1.511 | 18.167 | 31.097 |
| 2008/2009 | 3.640[1] | 4.638 | 3.095 | 1.393 | 1.848 | | 1.621 | 18.167 | 30.762 |
| 2009/2010 | 3.640[1] | 4.406 | 2.940 | 1.323 | 1.756 | | 1.540 | 17.259 | 29.224 |
| 2010/2011 | 2.600[1] | 4.274 | 2.852 | 1.323 | 1.756 | | 1.540 | 13.259 | 25.004 |
| 2011/2012 | 1.700 | 4.657 | 2.657 | 1.058 | 1.405 | | 1.386 | 10.607 | 23.300 |
| 2012/2013 | 1.530 | 4.626 | 2.567 | 1.011 | 1.533 | | 1.386 | 10.607 | 23.260 |
| 2013/2014 | 1.530 | 4.441 | 2.387 | 1.011 | 1.533 | | 1.386 | 9.865 | 22.153 |
| 2014/2015 | 1.530 | 4.455 | 2.387 | 1.029 | 1.530 | | 1.386 | 9.865 | 22.182 |
| 2015/2016 | 1.530 | 4.455 | 2.387 | 1.029 | 1.530 | | 1.386 | 9.865 | 22.182 |

*Kelda: Fiskimálaráðið, JM*

*1) Í bólki 1, lemmatrolarar, vóru í 2009/2010 13 loyvir, sum fiskaðu umleið 280 dagar í miðal um árið. Bólkur 1 kom ikki uppí fiskidagaskipanina fyrr enn í 2011, tá bólkur 1 varð lagdur saman við bólki 2.*

**Mynd 2. Fiskidagatal í 1996/1997 og 2013/2014**




Fiskidagatalið er skorið úr 49.585 døgum í 1997 niður í 22.182 fiskidagar fiskiárið 2015/16, ein skerjing á meiri enn 55%. Síðan 2008 er fiskidagatalið skorið við umleið 8.600 døgum, ein skerjing á 28%.

Bólkur 1, lemmatrolarar, var upprunaliga ikki partur av Fiskidagaskipanini, men gjørdist partur av skipanin í 2010, tá hann varð lagdur saman við bólki 2. Talið av fiskidøgum hjá bólki 2 (samanlagdur við bólk 1) er minkað úr 11.735 døgum niður í 5.985 dagar.

# Skjal 1. Veiðuhagtøl

Veiðuhagtølini er gjørd upp fyri 12 mánaðar tíðarskeiðið frá 1. mai til 30. apríl.

**Talva 1. Samlað fiskiveiða í føroyskum sjóøki 1. mai – 30. apríl, árini 2006-2016**

| | 2006/07 | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur** | 12.034 | 11.784 | 9.400 | 10.587 | 12.787 | 10.126 | 6.229 | 5.286 | 6.190 | 8.175 |
| **Hýsa** | 13.653 | 9.136 | 4.995 | 4.673 | 3.650 | 2.879 | 2.590 | 2.390 | 2.404 | 3.084 |
| **Upsi** | 56.953 | 53.114 | 53.182 | 48.834 | 31.813 | 29.180 | 28.071 | 23.189 | 19.231 | 23.184 |
| **Longa** | 3.343 | 2.940 | 3.667 | 3.536 | 4.122 | 4.566 | 4.345 | 3.572 | 4.701 | 4.343 |
| **Brosma** | 2.305 | 2.171 | 2.956 | 2.386 | 2.997 | 3.160 | 2.465 | 1.097 | 1.385 | 1.369 |
| **Kongafiskur** | 2.872 | 1.810 | 1.075 | 1.687 | 1.220 | 907 | 722 | 698 | 632 | 740 |
| **Svartkalvi** | 941 | 1.686 | 2.250 | 1.797 | 952 | 2.005 | 2.493 | 2.517 | 3.339 | 3.087 |
| **Havtaska** | 4.143 | 2.722 | 1.508 | 1.820 | 2.134 | 1.698 | 689 | 545 | 511 | 586 |
| **Stinglaksur** | 880 | 725 | 878 | 952 | 713 | 385 | 185 | 714 | 587 | 917 |
| **Gulllaksur** | 12.696 | 14.597 | 21.269 | 18.838 | 18.655 | 19.030 | 11.877 | 13.752 | 12.042 | 13.002 |
| **Makrelur** | 0 | 0 | 1 | 6 | 5.717 | 17.160 | 18.321 | 25.198 | 36.462 | 21.935 |
| **Sild** | | | | | 803 | 2.994 | 3.698 | 14.999 | 2.506 | 1.200 |
| **Annað** | 7.921 | 6.196 | 4.372 | 3.901 | 3.853 | 9.657 | 9.486 | 8.020 | 6.895 | 5.617 |
| **Tils.** | **117.738** | **106.881** | **105.553** | **99.017** | **89.416** | **103.746** | **91.171** | **101.977** | **96.886** | **87.239** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 2. Toskur støddarbýttur, 1. mai - 30. apríl, árini 2006-2016 (í tonsum)**

| | 2006/07 | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur 0** | 164 | 51 | 91 | 79 | 51 | 136 | 252 | 119 | 89 | 148 |
| **Toskur 1** | 840 | 847 | 782 | 627 | 640 | 953 | 717 | 486 | 624 | 609 |
| **Toskur 2** | 2.639 | 2.786 | 1.936 | 1.524 | 1.714 | 2.109 | 1.468 | 1.181 | 1.617 | 1.663 |
| **Toskur 3** | 4.011 | 3.890 | 3.374 | 3.770 | 4.108 | 3.469 | 2.214 | 1.912 | 2.025 | 3.160 |
| **Toskur 4** | 3.046 | 3.501 | 2.773 | 3.759 | 4.380 | 2.581 | 1.451 | 1.422 | 1.544 | 2.414 |
| **Toskur 5** | 1.334 | 709 | 444 | 828 | 1.894 | 878 | 127 | 166 | 288 | 179 |
| **Tils.** | **12.037** | **11.784** | **9.400** | **10.587** | **12.787** | **10.126** | **6.229** | **5.286** | **6.189** | **8.175** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 3. Toskur støddarbýttur, 1. mai - 30. apríl, árini 2006-2016 (í prosentum)**

| | 2006/07 | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur 0** | 1% | 0% | 1% | 1% | 0% | 1% | 4% | 2% | 1% | 2% |
| **Toskur 1** | 7% | 7% | 8% | 6% | 5% | 9% | 12% | 9% | 10% | 7% |
| **Toskur 2** | 22% | 24% | 21% | 14% | 13% | 21% | 24% | 22% | 26% | 20% |
| **Toskur 3** | 33% | 33% | 36% | 36% | 32% | 34% | 36% | 36% | 33% | 39% |
| **Toskur 4** | 25% | 30% | 30% | 36% | 34% | 25% | 23% | 27% | 25% | 30% |
| **Toskur 5** | 11% | 6% | 5% | 8% | 15% | 9% | 2% | 3% | 5% | 2% |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 4. Toskaveiðan frá 1. mai 2015 til 30. apríl 2016, býtt út á støddir og skipabólk (í tonsum)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4A | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Úr flotan-um o.o. | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur 0** | 51 | 13 | 39 | 6 | 22 | 3 | 13 | 1 | 0 | 148 |
| **Toskur 1** | 138 | 289 | 10 | 63 | 32 | 33 | 45 | 0 | 0 | 609 |
| **Toskur 2** | 423 | 646 | 22 | 133 | 181 | 89 | 169 | 1 | 0 | 1.663 |
| **Toskur 3** | 538 | 848 | 101 | 318 | 508 | 339 | 508 | 0 | 0 | 3.160 |
| **Toskur 4** | 312 | 433 | 134 | 338 | 261 | 370 | 567 | 0 | 0 | 2.414 |
| **Toskur 5** | 45 | 9 | 9 | 14 | 17 | 31 | 53 | 0 | 0 | 179 |
| **Tils.** | **1.506** | **2.239** | **315** | **871** | **1.022** | **865** | **1.354** | **1** | **1** | **8.174** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við Bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 5. Toskaveiðan frá 1. mai 2015 til 30. apríl 2016, býtt út á støddir og skipabólk (prosent)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4A | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Úr flotanum | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur 0** | 3% | 1% | 12% | 1% | 2% | 0% | 1% | 42% | 0% | 2% |
| **Toskur 1** | 9% | 13% | 3% | 7% | 3% | 4% | 3% | 11% | 0% | 7% |
| **Toskur 2** | 28% | 29% | 7% | 15% | 18% | 10% | 12% | 38% | 0% | 20% |
| **Toskur 3** | 36% | 38% | 32% | 36% | 50% | 39% | 38% | 6% | 0% | 39% |
| **Toskur 4** | 21% | 19% | 42% | 39% | 26% | 43% | 42% | 4% | 0% | 30% |
| **Toskur 5** | 3% | 0% | 3% | 2% | 2% | 4% | 4% | 0% | 0% | 2% |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **0%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við Bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 6. Toskaveiðan frá 1. mai 2015 til 30. apríl 2016, prosentvísabýtið hjá hvørjum skipabólki, býtt á støddir.**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Úr flotanum | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur 0** | 35% | 9% | 26% | 4% | 15% | 2% | 9% | 0% | 0% | 100% |
| **Toskur 1** | 23% | 47% | 2% | 10% | 5% | 5% | 7% | 0% | 0% | 100% |
| **Toskur 2** | 25% | 39% | 1% | 8% | 11% | 5% | 10% | 0% | 0% | 100% |
| **Toskur 3** | 17% | 27% | 3% | 10% | 16% | 11% | 16% | 0% | 0% | 100% |
| **Toskur 4** | 13% | 18% | 6% | 14% | 11% | 15% | 23% | 0% | 0% | 100% |
| **Toskur 5** | 25% | 5% | 5% | 8% | 10% | 17% | 30% | 0% | 0% | 100% |
| **Tils.** | **18%** | **27%** | **4%** | **11%** | **12%** | **11%** | **17%** | **0%** | **0%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við Bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 7. Upsaveiðan 1. mai - 30. apríl árini 2006-2016, støddarbýtt (í tonsum)**

| | 2006/07 | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upsi 0** | 2.490 | 2.575 | 4.510 | 3.242 | 1.185 | 824 | 1.558 | 887 | 683 | 846 |
| **Upsi 1** | 1.917 | 1.557 | 1.466 | 2.064 | 1.791 | 3.033 | 2.300 | 1.770 | 1.944 | 2.501 |
| **Upsi 2** | 5.093 | 6.123 | 7.493 | 12.010 | 8.791 | 8.463 | 4.075 | 2.744 | 4.335 | 4.709 |
| **Upsi 3** | 28.090 | 26.353 | 24.931 | 25.511 | 13.978 | 7.580 | 6.897 | 10.441 | 9.281 | 6.619 |
| **Upsi 4** | 10.392 | 9.468 | 7.132 | 4.106 | 3.647 | 3.043 | 5.189 | 4.001 | 1.790 | 2.031 |
| **Upsi 5** | 8.971 | 7.000 | 7.458 | 1.891 | 2.344 | 5.977 | 7.676 | 3.241 | 1.155 | 5.607 |
| **Upsi 6** | | 38 | 192 | 10 | 77 | 262 | 331 | 105 | 42 | 920 |
| **Tils.** | **56.953** | **53.114** | **53.182** | **48.834** | **31.813** | **29.180** | **28.026** | **23.189** | **19.231** | **23.233** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 8. Upsaveiðan 1. mai - 30. apríl árini 2006-2016, støddarbýtt (í prosentum)**

| | 2006/07 | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upsi 0** | 4% | 5% | 8% | 7% | 4% | 3% | 6% | 4% | 4% | 4% |
| **Upsi 1** | 3% | 3% | 3% | 4% | 6% | 10% | 8% | 8% | 10% | 11% |
| **Upsi 2** | 9% | 12% | 14% | 25% | 28% | 29% | 15% | 12% | 23% | 20% |
| **Upsi 3** | 49% | 50% | 47% | 52% | 44% | 26% | 25% | 45% | 48% | 28% |
| **Upsi 4** | 18% | 18% | 13% | 8% | 11% | 10% | 19% | 17% | 9% | 9% |
| **Upsi 5** | 16% | 13% | 14% | 4% | 7% | 20% | 27% | 14% | 6% | 24% |
| **Upsi 6** | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 1% | 1% | 0% | 0% | 4% |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 9. Upsaveiðan 1. mai 2015 til 30. apríl 2016, býtt út á støddir og skipabólk (í tonsum)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Úr flotanum | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upsi 0** | 624 | 39 | 8 | 29 | 11 | 37 | 49 | 0 | 49 | 846 |
| **Upsi 1** | 2.216 | 47 | 43 | 97 | 28 | 23 | 47 | 0 | 0 | 2.501 |
| **Upsi 2** | 4.447 | 52 | 32 | 87 | 30 | 18 | 43 | 0 | 0 | 4.709 |
| **Upsi 3** | 6.416 | 21 | 20 | 60 | 26 | 21 | 55 | 0 | 0 | 6.619 |
| **Upsi 4** | 1.960 | 3 | 5 | 22 | 11 | 13 | 16 | 0 | 0 | 2.031 |
| **Upsi 5** | 5.527 | 1 | 6 | 12 | 8 | 15 | 37 | 0 | 0 | 5.607 |
| **Upsi 6** | 912 | 0 | 3 | 1 | 1 | 0 | 3 | 0 | 0 | 920 |
| **Tils.** | **22.102** | **164** | **118** | **307** | **117** | **126** | **250** | **0** | **49** | **23.233** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við Bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 10. Upsaveiðan 1. mai 2015 til 30. apríl 2016, býtt út á støddir og skipabólk (í prosentum)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Úr flotanum | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upsi 0** | 3% | 24% | 7% | 9% | 10% | 29% | 20% | 0% | 0% | 4% |
| **Upsi 1** | 10% | 29% | 37% | 31% | 24% | 18% | 19% | 0% | 0% | 11% |
| **Upsi 2** | 20% | 32% | 28% | 28% | 26% | 14% | 17% | 0% | 0% | 20% |
| **Upsi 3** | 29% | 13% | 17% | 20% | 22% | 16% | 22% | 0% | 0% | 28% |
| **Upsi 4** | 9% | 2% | 4% | 7% | 10% | 10% | 7% | 0% | 0% | 9% |
| **Upsi 5** | 25% | 1% | 5% | 4% | 7% | 12% | 15% | 0% | 0% | 24% |
| **Upsi 6** | 4% | 0% | 3% | 0% | 1% | 0% | 1% | 0% | 0% | 4% |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **0%** | **0%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við Bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 11. Hýsuveiðan frá 1. mai - 30. apríl, árini 2006-2016, støddarbýtt (í tonsum)**

| | 2006/07 | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hýsa 0** | 222 | 322 | 210 | 197 | 231 | 152 | 211 | 209 | 198 | 226 |
| **Hýsa 1** | 376 | 269 | 229 | 376 | 281 | 232 | 165 | 165 | 222 | 298 |
| **Hýsa 2** | 6.174 | 4.211 | 2756 | 2.947 | 2.113 | 1.609 | 1.134 | 1.364 | 1.325 | 1.547 |
| **Hýsa 3** | 6.498 | 4.081 | 1721 | 1.079 | 936 | 747 | 1.051 | 635 | 622 | 946 |
| **Hýsa 4** | 383 | 212 | 78 | 70 | 87 | 139 | 30 | 17 | 37 | 67 |
| **Hýsa 5** | 0 | 41 | 1 | 4 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Tils.** | **13.653** | **9.136** | **4.995** | **4.673** | **3.650** | **2.879** | **2.591** | **2.390** | **2.404** | **3.084** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 12. Hýsuveiðan 1. mai - 30. apríl, árini 2006-2016, støddarbýtt (í prosentum)**

| | 2006/07 | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hýsa 0** | 2% | 4% | 4% | 4% | 6% | 5% | 8% | 9% | 8% | 7% |
| **Hýsa 1** | 3% | 3% | 5% | 8% | 8% | 8% | 6% | 7% | 9% | 10% |
| **Hýsa 2** | 45% | 46% | 55% | 63% | 58% | 56% | 44% | 57% | 55% | 50% |
| **Hýsa 3** | 48% | 45% | 34% | 23% | 26% | 26% | 41% | 27% | 26% | 31% |
| **Hýsa 4** | 3% | 2% | 2% | 1% | 2% | 5% | 1% | 1% | 2% | 2% |
| **Hýsa 5** | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 13. Hýsuveiðan 1. mai 2015 til 30. apríl 2016, býtt út á støddir og skipabólk (í tonsum)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hýsa 0** | 123 | 46 | 28 | 1 | 20 | 3 | 6 | 0 | **226** |
| **Hýsa 1** | 23 | 151 | 12 | 44 | 11 | 40 | 18 | 0 | **298** |
| **Hýsa 2** | 90 | 589 | 91 | 337 | 113 | 224 | 104 | 0 | **1.547** |
| **Hýsa 3** | 66 | 249 | 86 | 207 | 73 | 178 | 86 | 0 | **946** |
| **Hýsa 4** | 7 | 8 | 8 | 15 | 5 | 16 | 8 | 0 | **67** |
| **Tils.** | **309** | **1.043** | **224** | **604** | **222** | **461** | **222** | **0** | **3.084** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við Bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 14. Hýsuveiðan 1. mai 2015 til 30. apríl 2016, býtt út á støddir og skipabólk (í prosentum)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hýsa 0** | 40% | 4% | 12% | 0% | 9% | 1% | 2% | 0% | **7%** |
| **Hýsa 1** | 7% | 14% | 5% | 7% | 5% | 9% | 8% | 0% | **10%** |
| **Hýsa 2** | 29% | 56% | 40% | 56% | 51% | 49% | 47% | 0% | **50%** |
| **Hýsa 3** | 22% | 24% | 38% | 34% | 33% | 39% | 39% | 0% | **31%** |
| **Hýsa 4** | 2% | 1% | 3% | 3% | 2% | 4% | 4% | 0% | **2%** |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **0%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við Bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

## Skjal 2. Frágreiðingin: Samrøðukanning millum fiskimenn 2016
Frágreiðingin er hjáløgd sum sjálvstøðugt skjal.

## Skjal 3. Framløga: Skip & bátar, atgongd og dagar
Framløgan er hjáløgd sum sjálvstøðugt skjal.